# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 7. mars 2024 |
| Mál nr.: | 24/04339 |
| Málsviðgjørt: | SM |
| Eftirkannað: | 27.02.2024 |

## Uppskot til

## samtyktar um tjóðartrygdarpolitikk

Løgtingið tekur undir við, at landsstýrið, fyri at samstarva um frið, fólkaræði, mannarættindi og støðufesti í heiminum og at fremja tryggleika Føroya fólks og fólkaræði tess, tryggja landa- og sjóumveldi og verja ta vælferð, undirstøðukervi og tær samfelagsskipanir, sum hava týdning fyri Føroya fólk, virkar eftir hesum aðalmálum:

1) Føroyar virka fyri, at friður, fólkaræði, mannarættindi og støðufesti valda.

2) Øll millumtjóða trygdar- og verjupolitisk átøk, ið Føroyar taka undir við, virka fyri ella taka lut í, skulu vera í samsvari við altjóða lóg og byggja á millumtjóðaavtalur og samstørv.

3) Føroyar skulu taka egna ábyrgd í trygdar- og verjupolitikki. Allar ætlanir og avgerðir um tað, ið fer fram í føroyskum sjógvi, landi og í loftrúmi, skulu viðgerast av føroyskum myndugleikum, sum fólkaræðisliga standa til svars mótvegis Løgtinginum og Føroya fólki.

4) Átøk verða sett í verk, sum styrkja sivilar trygdar- og tilbúgvingarstovnar, og sum byrgja fyri netálopum, fremja nettrygd og verja undirstøðukervi, sum er týðandi fyri, at samfelagið virkar.

5) Við støði í hesum fara føroyskir myndugleikar undir skipað samskifti við ríkismyndugleikarnar, grannalondini og við Norðuratlantssáttmálafelagsskapin (NATO) fyri at eyðmerkja viðkomandi samstarvsmøguleikar, ið kunnu fremja trygd og verju, herímillum hvussu Føroyar kunnu vera við til at røkja trygdaráhugamál á norðurleiðum.

6) Endamálið er at gerast partur av øllum trygdar- og verjupolitiskum tilgongdum og avgerðum, sum í sínámillum viðurskiftum við onnur lond og í millumtjóða høpi eru viðkomandi fyri Føroyar, og tað øki, Føroyar eru partur av.

7) Samstarv um trygdarpolitisk mál og føroysk luttøka í verju- og hernaðarpolitiskum samstørvum skal fara fram á sivilum grundarlagi og skal røkja føroysk trygdaráhugamál og trygdaráhugamál hjá Útnorðurlondunum, Norðurlondum, grannalondum og øðrum sameindum londum í NATO.

8) Føroyar og sjóumveldi Føroya eru kjarnorkuvápnafrítt øki, og Føroyar taka undir við avvápnan og ikkispjaðing av hópoyðingarvápnum, eisini kjarnorkuvápnum, sambært altjóða lóg.

9) Lofteftirlit, haveftirlit og útinnan av ræðisrættindunum við Føroyar verða framd í samstarvi millum føroyskar myndugleikar og viðkomandi samstarvspartar.

10) Til tess at samfelagið kann standa ímóti samansettum hóttanum, skal tjóðartilbúgvingin leggja upp fyri hóttanum móti almennari trygd, nettrygd, veitingartrygd, matvøruveitingartrygd, fólkaheilsu, umhvørvi, náttúru, ognum og virðum.

## 1. Viðmerkingar til uppskot til samtyktar

### Orsøkin til uppskotið

Endamálið hjá landsstýrinum við hesum uppskoti til samtyktar er at fáa Løgtingsins undirtøku fyri støðu Føroya í trygdar- og verjupolitiskum viðurskiftum.

Sum tjóð og millumtjóðasáttmálapartur á fleiri økjum eru Føroyar ein partur av heimssamfelagnum við egnum áhugamálum, skyldum og rættindum. Eyðmerkir landsstýrið ikki føroysk áhugamál og virkar fyri at røkja tey, er vandi fyri, soleiðis sum heimspolitikkur vanliga fyriferst, at onkur annar ger tað. Eisini tá ið um ræður trygdar- og verjupolitikk.

Tað eru altíð føroysk altjóða- og tjóðaráhugamál, sum stýra uttanríkis- og trygdarpolitisku kósini. Útgangsstøðið fyri kósini er tryggleiki Føroya fólks og at verja ta vælferð og tær samfelagsskipanir, ið hava týdning fyri føroyska fólkaræðið, og at vit taka beinleiðis ábyrgd í heiminum og heimssamfelagnum fyri at tryggja frið, fólkaræði, mannarættindi og støðufesti við altjóða lóg og avtalum.

Aðalmálið við einum føroyskum tjóðartrygdarpolitikki er, at trygd og friður skulu valda, og at føroyskir myndugleikar skulu hava ein virknan leiklut at røkka hesum máli. Fyri at kunna átaka sær ein slíkan leiklut, er neyðugt við skipaðum samskifti við grannalondini, við verjusamgonguna NATO og við allar viðkomandi myndugleikar um trygdar- og verjupolitikk.

Skulu avgerðir takast viðvíkjandi trygdarpolitiskum spurningum, verða ásetingarnar í stýrisskipanarlógini fylgdar. Tað merkir, at avgerðir, sum krevja Løgtingsins luttøku fyri at verða útintar, t.e. lógarheimild, lógarbroyting ella játtan, ella annars eru týdningarmiklar, verða lagdar fyri Løgtingið. Í málum, sum hava stóran uttanríkispolitiskan týdning, ráðførir landsstýrið seg við Løgtingsins uttanlandsnevnd. Nær eitt mál, ið ikki beinleiðis krevur Løgtingsins samtykki fyri at verða útint, er so týdningarmikið, at tað skal leggjast fyri Løgtingið, er ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri.

### Eitt heimspolitiskt og trygdarpolitiskt vegamót

Hóast kalda kríggið elvdi til vápnadubbing, vandar og skuggakríggj ymsastaðni í heiminum, umframt ótta fyri kjarnorkubardaga í einum tvíbýttum heimi við ógvusligum mótpólum millum risaveldini fyri eystan og vestan, hava Føroyar havt ómetaligan framíhjárætt á norðurleiðum, her friður og trygd hava valdað síðani seinna heimsbardaga.

Í løtuni henda stórar rembingar á heimspolitiska pallinum. Síðan kalda kríggið endaði fyri góðum tretivu árum síðani, hevur USA nærum sum einsamalt risaveldi sett dagsskránna í heimspolitisku skipanini og í trygdar- og verjumálum.

Vanliga fatanin gjørdist í okkara parti av heiminum, at altjóðagerð, demokratisering, búskaparlig samanrenning, víðfevnt álitisfremjandi samstarv, sínámillum handil og opinleiki merkja gongdina og virkað fyri eini heimsskipan, sum er myndað av støðufesti og tryggleika.

Hugmyndin um altjóða lóg og sínámillum samstarv sum grundarlagi fyri friði og trygd í heiminum fekk tó eisini fleiri skot fyri bógvin, m.a. tá ið ST-samtyktir vórðu settar til viks og lopið varð á Irak fyrst í øldini. Løgtingið mótmælti tá hesum álopi.

Hóast eitt slag av strategiskum støðufesti valdaði í stórum pørtum av heiminum í árunum eftir kalda kríggið, vóru ófriður og stríð framhaldandi ein partur av heimspolitikki. Borgarakríggj, kríggj, uppreistur og yvirgangur vóru tó fyribrigdi, sum kendust lutfalsliga fjarskotin í mun til gerandisdagin á norðurleiðum.

Nógv settu sínar vónir til tey einmælt samtyktu ST-heimsmálini um burðardygga menning í 2015 sum grundarlag fyri at styrkja hugsjónina og málið um sameindar tjóðir, altjóða samstarv, mannarættindi og einum meira rættvísum og friðarligum heimi fyri heimsins fólk.

Men rembingarnar nú og avleiðingarnar av teimum tykjast í løtuni at hava elvt til, at tíðarskeiðið við altjóðagerð sum høvuðstátti er farið afturum. Ístaðin bendir alt á, at heimurin letur seg aftur í eina fleirásaða skipan við ymsum sameiningum og strategium, ið krossa og fara útum vanligar fatanir av heimsskipan og valdsjavnvág. Vit síggja nýggjar farvegir av kappingum millum lond og stórveldi, sum nógv bendir á fara at eyðmerkja heimspolitiska pallin í nøkur ár frameftir. Strategiskar langtíðarætlanir kunnu hugsast at verða ein berandi bulur í hesi kapping. Lond síggja tørv á at kappast um m.a. ráevni, tilfeingi og tøkni við egnari trygd og verju fyri eyga.

Russland vísir seg sum eina hernaðarliga hóttan í Evropa. Í breiðari høpi er Kina ein langskygd strategisk avbjóðing fyri vesturheimin. Og fleiri av sonevndum *Global South*-londum, ið tilsamans er fólkaríkasti parturin av heiminum, finna saman heldur enn at velja síðu í eini tví- ella trípólaðari heimsskipan.

Samstundis er heimurin meira samanrunninn búskaparliga, tøkniliga og mentanarliga enn nakrantíð fyrr. Tí er nógv upp á spæl, nú heimspolitiska valdsjavnvágin fragmenterast og valdspólarnir verða fleiri.

Kríggið í Ukraina hevur verið við til at skunda enn meira undir hesa gongd. Mong hava skilmarkað ólógligu innlimanina av Krim í Russland í 2014 sum eitt vegamót, har eitt nýtt tíðarskeið tók skap, og innrásina í Ukraina í 2022 sum staðfesting um, at eitt nýtt tíðarskeið við eini broyttari heimsskipan er byrjað.

Eitt tekin um eina valdsjavnvág í broyting, er størri óvissa og stríð, ið taka seg upp. Umframt kríggj í Ukraina, hava seinastu mánaðirnir verið merktir av kríggi í Gasa millum Ísrael og Hamas og av virksemi hjá Houthi-rørsluni, ið hevur gjørt uppreistur í pørtum av Jemen og ger seg inn á altjóða skipaferðslu í Adenflógva og Reyðahavi.

Trygdarpolitiska fyribrigdið er seinnu árini víðkað munandi og røkkur í altjóða politikki í dag eisini inn á málsøki sum handil, fjarskifti, tøkni, orku, gransking, atgongd til ávíst tilfeingi, flutning og veiting. Tøknilig menning, herímillum eisini vitlíki, hevur harumframt alsamt vaksandi ávirkan á vald í heimssamfelagnum. At trygdarpolitiska fyribrigdið víðkast, setir størri krøv til føroyskar myndugleikar, tá ið um ræður at fyrisita trygdarpolitisk atlit á yvirtiknum málsøkjum, har tað er Løgtingið, ið lóggevur.

Í hesum høpi er hugtakið strategiskt sjálvbjargni ein snúningsás. Tað merkir evnini at klára seg sjálvan og vera bundin minst møguligt at øðrum og skiftandi umstøðum og broytingum. At raðfesta egna vitan og framleiðslu. Bæði sum land og sum samsintur samstarvspartur í einum trygdarpolitiskum samanhangi.

Lond í Evropa taka miðvís stig fyri at gerast meira strategiskt sjálvbjargin. Bæði sjálvi og saman við samsintum, ið tey eru í felagsskapi við. Verjugarðar verða settir upp kring týðandi vinnur, vitan og undirstøðukervi, og dentur er á at menna egna tøkni, tryggja veitarar og leggja flutning og framleiðslu neyvari til rættis.

Sum heild hava Føroyar notið gott av fleiri áratíggjum við altjóðagerð, regionalum tryggleika og opnum heimshandli. Ein meira fragmenterað heimsskipan kann ávirka møguleikarnar fyri handli og samstørvum á summum økjum, og hetta kann eisini fáa avleiðingar fyri Føroyar í uttanríkis- og trygdarpolitiskum høpi. Fyri Føroyar og fólkið á norðurleiðum, er gongdin í heiminum í løtuni ikki samsvarandi teimum virðum og málum, sum vit helst høvdu ávísar vónir um fyri bert lutfalsliga fáum árum síðani. Tí er neyðugt at seta eina greiða uttanríkis-, trygdar- og verjupolitiska kós.

Í Evropa og í NATO er samanhald ein fortreyt fyri tryggleika. Í einum heimi í broyting, leggur landsstýrið serligan dent á samstarv við samsint, sum vilja frið, fólkaræði, mannarættindi og støðufesti. Samstundis er umráðandi ikki at gera millumtjóða samstarv til ein spurning um antin ella, grundað á heimsmynd, ið er svørt og hvít. Eins og lond flest, skulu Føroyar, á einum opnum og gjøgnumskygdum grundarlagi, framhaldandi raðfesta samstarv um mál og viðurskifti, ið tæna føroyskum áhugamálum, og teimum málum, Føroyar virka fyri í millumtjóða høpi.

**Norðuratlantssáttmálafelagsskapurin (NATO)**
At landsstýrið leggur fyri Løgtingið uppskot til samtyktar um tjóðartrygdarpolitikk Føroya er ein ásannan av, at trygd, tryggleiki og friður ikki eru ein sjálvfylgja í viðurskiftunum millum lond. Hinvegin eru tey ein fortreyt fyri tí frælsa og fólkaræðisliga tilverugrundarlagi, menning og vælferð, sum lond og borgarar teirra um okkara leiðir hava. Fyri at varðveita og styrkja hesa støðu, samstarva flestu londini um okkara leiðir um verju og trygd, og hava tí somu grundleggjandi trygdaráhugamál.

Mest víðfevnda samstarvið hesum viðvíkjandi er Norðuratlantssáttmálafelagsskapurin, NATO. NATO varð skipað í 1949 og fevnir í dag um 32 lond. Kjarnin í NATO-samstarvinum er grein 5 í stovnandi Washington-sáttmálanum, sum ásetur, at eitt álop á eitt limaland er at meta sum eitt álop á øll limalond. Tí tekur henda samgongan sær rættin at svara álopum á limalond í felag.

Føroyar eru miðdepil í tí øki, sum Washington-sáttmálin fevnir um, og sum NATO hevur skyldu at verja. Føroyar hava tí somu grundleggjandi trygdar- og verjuáhugamál, sum hini londini í NATO.

Tá ið Danmark staðfesti Norðuratlantssáttmálan í 1949, varð umveldisfyrivarni ikki tikið fyri Føroyum, og Føroyar eru tí partur av NATO. Føroyskir myndugleikar fingu ikki innliman Danmarkar ríkis til ummælis í 1949, hóast tað, sambært § 7 í heimastýrislógini, átti at havt verið gjørt.

Í mong ár hava norðurleiðirnar fylt lutfalsliga lítið í NATO høpi. Støðufesti og samstarv hava merkt gongdina í økinum. Í stóran mun hevur Arktiska ráðið, ið ikki viðger trygdarpolitikk, sett dám á dagsskránna fyri samstarv millum londini í norðurhøvum. Seinnu árini hevur áhugin fyri trygd og verju á norðurleiðunum verið vaksandi. Norðurleiðirnar (The High North) fylla alsamt meira í NATO høpi og verður nevnt í t.d. 2030 Strategiska konseptinum og í yvirlýsingum frá NATO toppfundum.

Umframt tær broytingar, sum henda á heimspolitiska pallinum, og sum eru lýstar, er ein orsøk fyri tí økta áhuganum hjá NATO fyri trygd og verju á norðurleiðum og í Arktis, at Russland seinnu árini hevur gjørt íløgur í og útbygt síni verjuevni fram við norðurstrondini. Ein onnur orsøk er, at veðurlagsbroytingar bera í sær minni ís og lata upp nýggjar siglingarleiðir, ið eisini í verjuhøpi kunnu hava strategiskar avleiðingar. Ein triðja orsøk er, at síðan kríggið í Ukraina, er russiski norðurflotin vorðin lutfalsliga meira strategiskt týdningarmikil fyri Russland. Tilfeingið í norðurhøvum og á norðurleiðum hevur eisini øktan áhuga hjá heimsins londum og stórveldum, og kann tí hava trygdarpolitiskan týdning.

Føroyar liggja væl fyri, um nýggjar siglingarleiðir norðanfyri lata seg upp. Eisini eru Føroyar miðskeiðis í sonevnda GIUK-gapinum (*Greenland-Iceland-United Kingdom)* ella teirri linju, sum ger, at Norðuratlantshav kann verjast ímóti hóttanum norðanífrá.
Sostatt ber landafrøðiliga støða Føroya í sær, at Føroyar, loftrúmið yvir Føroyum, undirstøðukervi eftir botni og føroyskt sjóøki hava stóran trygdar- og verjupolitiskan týdning fyri grannalondini.

Høvuðstátturin í verjuætlanini hjá NATO er ræðing. Tað er at hava so góð evni sum gjørligt til at svara aftur og standa ímóti við, at ein mótpartur letur vera við at leypa á.
Uttanríkis- og trygdarpolitikkur snýr seg eins nógv um at taka ábyrgd sum at krevja rættindi og fyrimunir.

Tí er umráðandi, at Føroyar taka lut og eru við til at mynda gongdina, nú NATO og limalondini í størri mun enn fyrr vísa norðurleiðunum ans og áhuga. Føroyar skulu eftir førimuni vera við til at stuðla undir átøk, sum stuðla undir eina trúverda ræðingarætlan. Millum annað tá ið talan er um økt eftirlit á sjónum, í luftini og undir vatnskorpuni.

Við øktum eftirliti fylgir økt og meira sjónlig hernaðarlig hjávera, ið eisini er við til at tryggja trúverda ræðing. Í Føroyum hava munandi fleiri fremmand herskip lagt at seinnu árini, fremmand flogfør hava gjørt innflúgvingar- og lendingarroyndir, umframt at NATO-flotavenjingar hava verið í føroyskum sjóumveldi. Landsstýrið samstarvar harumframt við donsku stjórnina um at seta upp nýggjan lofteftirlitsradara á Sornfelli.

Tað er ein raðfesting, at Vørn og aðrir viðkomandi føroyskir myndugleikar og áhugapartar taka lut í t.d. flotavenjingum og øðrum viðkomandi átøkum, men føroyska íkastið til tílík átøk og samstørv er sivilt.

Føroyar skulu verða verandi kjarnorukuvápnafrítt øki, og tá ið fremmand før vitja í Føroyum, er tað ein treyt í diplomatiska loyvinum, at tey ikki hava evnafrøðilig, lívfrøðilig, geislavirkin ella kjarnorkuvápn. Henda treyt er eisini galdandi fyri kjarnorkurikin før, sum koma í føroyskt sjóumveldi. Við støði í tilbúgvingaratlitum skulu kjarnaorkurikin før harumframt lúka serstakar treytir, ið m.a. minka um váðan fyri geisladálking.

Landsstýrið leggur stóran dent á samskifti við tey lond í NATO, sum hava flotafør og aðrar styrkir til staðar í Norðuratlantshavi. Serliga USA, Bretland, Noreg, Danmark, Kanada, Týskland og Frakland.

Fyri at varðveita frið og støðufesti samstundis sum verjupolitiskt virksemi økist, er umráðandi at raka eina javnvág, ið eisini leggur upp fyri ótilætlaðum spenningsstøðum og minkar um sannlíkindini fyri misskiljingum. Tí er umráðandi at leggja dent á gjøgnumskygni

og forsøgni í raðfestingunum fyri virksemi í Norðuratlantshavi. Haldgott grundarlag skal vera fyri átøkum, ið verða sett í verk, til tess at ein trygdartvístøða ikki tekur seg upp. Ein trygdartvístøða er, tá ið átøk frá einum parti at økja um sína egnu trygd, elva til aftursvar frá øðrum pørtum. Úrslitið er ofta, at samlaða trygdin í roynd og veru versnar.

**Norðurlendskt verjusamstarv**
Nú Finnland er, og Svøríki verður limur í NATO, verða øll Norðurlond NATO limalond. Tað letur upp fyri nýggjum møguleikum innan samstarv um trygd og verju, sum eisini er viðkomandi fyri Føroyar. Bæði í NATO høpi og í norðurlendskum høpi. Tað hevur í mong ár verið ein miðvís raðfesting hjá Føroyum at gerast virknari í norðurlendskum samstarvi og luttaka á øllum viðkomandi økjum. Í hesum sambandi fer landsstýrið eisini undir at eyðmerkja viðkomandi møguleikar fyri samstarvi í norðurlendska verjusamstarvinum NORDEFCO.

Til tess at tryggja eitt haldgott vitanargrundarlag um uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikk, skulu Føroyar samstarva við eitt nú Grønland og Ísland og hinar norðurlendsku grannatjóðirnar um bæði gransking og útbúgving um friðarskapandi trygdarpolitikk.

**JEF**
Bretland stendur eisini á odda fyri samstarvinum *Joint Expeditionary Force (JEF)*, sum eisini fevnir um Danmark, Noreg, Ísland, Finnland, Svøríki, Estland, Litava, Lettland og Niðurlond. *JEF*-samstarvið hevur til endamáls at samskipa átøk, ið økja um trygdina í Norðuratlantshavi og í Eystrasalti. Landsstýrið fer tí at kanna møguleikarnar fyri, um Føroyar kunnu taka lut í viðkomandi samstørvum hjá *JEF*. Til dømis við serligum atliti at tilbúgving og bjarging.

**Tilbúgving**
Føroyska tjóðartilbúgvingin skal vera mótstøðufør móti hóttanum móti almennari trygd, nettrygd, veitingartrygd, matvøruveitingartrygd, fólkaheilsu, umhvørvi, náttúru, ognum og virðum. Regluligar váðametingar eiga at vera grundarlag undir tilbúgvingarstiginum í Føroyum.

Leggjast skal eisini í tilbúgvingarhøpi upp fyri samansettum (hybridum) hóttanum, ið kunnu ávirka samfelagsligt støðufesti og samfesti. Til dømis royndir at brúka falsupplýsingar at ávirka, bleyt valdsnýtsla, búskaparlig valdsnýtsla, netálop og dult virksemi.

Føroyskir myndugleikar, ið hava ábyrgd av sivilari trygd og tilbúgving, skulu styrkjast og samstarva beinleiðis við útlendskar myndugleikar, soleiðis at trygdar- og verjupolitikkur fremur sivila trygd og tilbúgving.

Virkað verður miðvíst fyri øktari føroyskari luttøku í millumtjóðasamstarvi um tilbúgving, serliga í norðurlendskum høpi. Í løtuni verður arbeitt ítøkiliga við, at Føroyar gerast partur av norðurlendska HAGA-tilbúgvingarsamstarvinum, og útlitini fyri at røkka á mál við hesum innan rúma tíð eru góð. Eisini í NATO fylla tilbúgving og samfelagsligt mótstøðuføri alsamt meira sum eitt verjupolitiskt amboð, og í tí sambandi eiga føroyskir myndugleikar at taka lut í munagóðum samstørvum, ið kunnu menna mótstøðuføri og tilbúgving í Føroyum.

**Nettrygd**
Talgildar skipanir, ið mangar virka sum grundleggjandi undirstøðukervi í dagsins samfelagi, eru í áhaldandi vanda fyri at verða álopnar. Regluliga frættist um einstaklingar, fyritøkur og skipanir, sum verða lagdar lamnar. Avleiðingarnar kunnu vera álvarsamar, um skipanir ikki

virka, um dátur brádliga ikki eru atkomuligar ella koma í skeivar hendur. Netálop kunnu raka føroyska samfelagið meint og hava álvarsamar avleiðingar fyri týðandi tænastur í okkara samfelagi, undir hesum heilsutænastur, elveiting og samskiftistænastur.

Tí hava átøk, ið fremja nettrygd, avgerandi týdning fyri eitt væl virkisført vælferðarsamfelag. Við støði í Nettrygdarætlanini 2024-2026 skulu átøk setast í verk, sum miðvíst fremja nettrygd, byrgja fyri netálopum og skipa eina munagóða tilbúgving, ið kann styrkja mótstøðuførið og avmarka avleiðingarnar, tá ið álop henda.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur yvirskipaðu ábyrgdina av at útinna nettrygdarætlanina og skipar arbeiðið saman við Fjarskiftiseftirlitinum og avvarðandi myndugleikum. Netálop, sum kunnu leggja samfelagið lamið, hava øgiligar avleiðingar. Tí er alneyðugt, at bæði landið, kommunurnar og privata vinnan raðfesta og gera íløgurnar, sum skulu til, fyri at átøkini í hesi ætlanini kunnu fremjast. Í ætlanini eru átta strategisk mál, ið skulu fremjast við 20 ítøkiligum átøkum. Í løtuni verður arbeitt miðvíst við at røkka fyrsta málinum í nettrygdarætlanini, sum er at kortleggja samfelagstýðandi undirstøðukervi. Talan er í stóran mun um fortreytina fyri at seta í verk onnur átøk á nettrygdarøkinum. Í komandi tingsetu verður lagt fyri Løgtingið uppskot til lóg um nettrygd.

**Trúnaðaratlit**
At fyrisita, handfara og viðgera trygdar- og verjumál krevur, at fyrisitingin skipar seg við fyriliti fyri, at talan stundum er um upplýsingar og vitan, sum eru trúnaðarfevndar. Tí er sett í gildi rundskriv um at trúnaðarflokka og verja upplýsingar, sum hava felags áhuga fyri londini í NATO, og tí krevja vernd. Talan er um reglur, sum samsvara við reglur í NATO londunum, og gera tað møguligt hjá føroyskum myndugleikum at lata og taka ímóti viðkomandi upplýsingum.

**Undanfarnar samtyktir**
Fyri at seta hetta uppskotið í ein breiðari samanhang og vísa á gongdina í trygdar- og verjupolitisku støðu Løgtingsins, er viðkomandi at tríva í undanfarnu løgtingssamtyktirnar um trygdar-, hernaðar- og verjumál.

Tá ið Bretland hersetti Føroyar, mótmælti Løgtingið við skrivi til bretska konsulin í Føroyum, dagsett 13. apríl 1940, við soljóðandi innihaldi:

*Føroya Løgting fekk í gjár boð um, at Ongland ætlar at seta hermenn á land at verja landið. Hetta hendir uttan áheitan Føroyinga.*
*Tað er støða tingsins at halda Føroyar uttanfyri bardagan og ósemjuna landanna millum. Tingið tekur fyrivarni viðvíkjandi sínum rættindum og mótmælir, at annað, um enn vinarliga sinnað, ríki setur hermenn á land her, men troðkandi umstøður valda, at einki býti er at gera. Føroya Løgting, sum gjøgnum øldir og undir skiftandi viðurskiftum hevur umboðað Føroyar, undir heimild teirra skrivaðu og óskrivaðu lóga, roknar við og ynskir, at einki verður broytt Føroyum viðvíkjandi uttan samráðing við tingið.*

Í 1959 viðgjørdi Løgtingið málið um at byggja radarastøð á Sornfelli. Eftir nevndarviðgerð samtykti Løgtingið 25. apríl 1959 hetta:

*Málið má haldast at vera avgjørt og verður tikið til eftirtektar.*
*Løgtingið undirstrikar sína andstøðu móti militerari útbygging í Føroyum í vanligari merking, um talan verður um slíka.*

Í sambandi við, at tað gjørdist kunnugt, at hermenn skuldu knýtast at støðunum í Føroyum, samtykti Løgtingið 12. mai 1961 at:

*Føroya løgting mótmælir, at hermenn verða knýttir at Sodnfellis- ella Eiðisstøðini og noktar fyri, at krígsútgerð verður goymd ella nýtt á føroyskum land- ella sjóøki.*

19. august 1970 samtykti Løgtingið hetta:

*Føroya løgting biður landsstýrið siga ríkisstjórnini frá, at tað sambært løgtingsviðtøku frá 13. apríl 1940 er løgtingsins støða, at Føroyar verða hildnar uttan fyri ósemjur landanna millum og hermálsligar samgongur, og at løgtingið sambært løgtingsmál nr. 14/1969 mótmælir, at hermenn verða knýttir at Sornfellis- ella Eiðisstøðini og noktar fyri, at krígsútgerð verður goymd á føroyskum land- ella sjóøki.*
*Landsstýrið verður samtundis biðið heita á ríkisstjórnina um at kanna líkindini nú at seta hesar løgtingsviðtøkur í verk.*
*Úrslitið av hesi kannan verður at leggja fyri løgtingið í vetrartingsetuni 1970/71.*

Leggjast kann afturat, at Løgtingið tók ikki av álvara málið uppaftur fyrr enn í 1983, og tá var spurningurin í størri mun tengdur at kjarnorkuvápnum.

Tað málið førdi til, at Løgtingið 24. februar 1984 samtykti hetta:

*Í samljóði við samtykt løgtingsins 19. august 1970 um, at Føroyar skulu haldast uttan fyri ósemjur landanna millum og at sýtt veður fyri, at stríðsútgerð verður goymd á føroyskum øki, lýsir løgtingið Føroyar at vera kjarnorkuvápnafrítt øki.*

18. mai 2004 samtykti Løgtingið uppskot til samtyktar um trygdarpolitikk Føroya, ið var soljóðandi:

*Løgtingið tekur undir við, at landsstýrið tekur neyðug stig til tess at røkja trygdarpolitisku, heruppií verjupolitisku, áhugamál Føroya samsvarandi hesum meginreglum:*

1. *Landsstýrið tryggjar sær fult innlit í trygdarpolitisk mál viðvíkjandi Føroyum og virkar fyri, at føroyskir myndugleikar á avgerandi hátt luttaka í øllum avgerðartilgongdum hesum viðvíkjandi.*
2. *Viðgerð landsstýrisins av trygdarpolitiskum málum skal vísa mesta umhugsni fyri trygd landsins og vælferð fólksins, og samskiftir landsstýrið við uttanlandsnevnd Løgtingsins í týdningarmiklum málum hesum viðvíkjandi.*
3. *Landsstýrið skal á hesum grundarlagi samskifta við viðkomandi myndugleikar til tess at viðgera á ábyrgdarfullan hátt slík mál, ið viðvíkja trygdarpolitisku støðu Føroya.*
4. *Til tess, at føroyskir myndugleikar kunnu umboða áhugamálini hjá landi og fólki á nøktandi hátt á trygdarpolitiska økinum, verða teir at skipa seg væl við atliti at handfaringini av trúnaðarupplýsingum.*

Uppskotið til samtyktar frá 2004 víkir frá undanfarnum samtyktum og skilmarkar av álvara eina vend í Løgtingsins støðu í trygdar- og verjumálum. Henda støða var áður merkt av frástøðu, ikki minst tí avgerðir mangan vórðu tiknar, uttan at føroyskir myndugleikar vóru partur av tilgongdini. Men í 2004 tekur Løgtingið undir við, at landsstýrið átekur sær ein virknari leiklut í trygdar- og verjumálum.

**Tjóðartrygdarpolitikkur 2024**
Uppskotið til samtyktar, sum nú verður lagt fram, skal tryggja fólkaræði fyri Føroya fólk í trygdar- og verjupolitiskum málum og avgerðum. Tað skal tryggja, at trygdar- og verjupolitiskt virksemi skal sameinast við sivila trygd og tilbúgving at verja fólk, fólkaræði, náttúru, vinnu, umhvørvi og tilfeingi.

Hóast formligu karmarnir fyri einum føroyskum tjóðartrygdarpolitikki eru lítið broyttir, síðani heimastýrislógina í 1948, eru fortreytirnar hjá føroyskum myndugleikum fyri einum virknum og ábyrgdarfullum leikluti í trygd og verju landsins øðrvísi, enn tær hava verið. Útgangsstøðið fyri uppskotinum er ikki tað sama, sum undir seinna kríggi, undir kalda krígnum ella í 2004. Hvørki í Føroyum, í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark ella á heimspolitiska pallinum.

Mál landsstýrisins í hesum uppskoti skulu røkkast við ábyrgd mótvegis Løgtinginum og atliti at trygd Føroya. Henda samtykt er, eins og tær undanfarnu, eitt úrslit av teirri tíð, hon er vorðin til í. Tí má við jøvnum millumbilum metast um tørvin á at dagføra ella endurnýggja tjóðartrygdarpolitikk Føroya til tess at tryggja, at hesin tænir sínum máli.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 7. mars 2024

**Høgni Hoydal**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen